


**Nr. 17** *16. august 2026* **86. árg.**

# Bønin kom ikki ov seint

*Í Mark. 11,24 lesa vit: „Alt tað, sum tit biðja um og tráa eftir, trúgvið, at tit hava fingið tað, tá skal tað verða tykkum fyri.“*

Her síggja vit sambandið millum bøn og tráan. Bønin má vera brennandi og innilig, ikki bara nøkur grunn orð, sum tú fert lættliga um, og sum hvørki hava ávirkan á anda tín ella á Gud. Nei, tú mást biðja heilhugað, so at tað verður ein tráan, sum nemur anda tín og Gud. Minst bara til, at bønarsvarið verður tikið ímóti í andanum, áðrenn tú sært tað í tí fysisku verðini.

Viðhvørt kunnu vit biðja eina serliga bøn, og vit hugsa samstundis, at tað finst einki svar upp á hesa bøn, tí fólkini, sum vit skuldu spyrja, hví viðurskiftini í okkara unga lívi vóru so og so, tey eru deyð. So sláa vit okkum til tols, at hesar bønir verða ósvaraðar, tí tær eru bidnar ov seint. Tey, sum kundu givið okkum bønarsvarið, eru deyð, og tí er tað púra ógjørligt hjá okkum at fáa nakað svar.

Lat meg siga tær, tað er ikki ov seint. Ikki avmarka Gud! Einki er ógjørligt hjá honum! Hann kennir endan á søguni, áðrenn hendingin nakrantíð er byrjað. Hann sær, at tað fara at vera fólk, sum fara at biðja so inniliga um eitt svar, og tí ger hann eisini møguleikar fyri, at tey fáa svarið.

Minst til, at bønarsvarið er ávegis til tín, annaðhvørt tað er av andaligum slagi ella okkurt materielt, tú biður um. Trúgv bara, at tú hevur fingið tað, so skal tað vera tær fyri. Hetta er ikki minst galdandi, tá ið tú biður um frelsu fyri tíni børn ella barnabørn. Viðhvørt kunnu ár ganga, áðrenn bønarsvarið kemur. Hesa tíðina er bara eitt at gera, halt fast í Guds lyfti.

Viðhvørt kann vegurin til frelsu vera langur hjá mongum menniskjum. Tey hava forherðað seg. Tey vilja ikki vita av Gudi, ella tey mugu ganga ígjøgnum kreppur og torfør ting, áðrenn Gud fær boygt hjarta teirra.

Ofta eru forbiðjararnir farnir heim til himmals uttan at síggja, at lyftini eru uppfylt. Men lyftini kunnu ikki svíkja. Gud hevur altíð ein veg, og hann vinnur at enda. Vit mugu bara prísa og takka honum, at vit merkja, at bønarsvarið er komið í okkara anda, og at tað fer at ganga út. Ofta mugu fleiri brikkar í hesari materialistisku verðini falla upp á pláss, áðrenn bønarsvarið gongur út. Tað einasta, eg kann siga eftir at hava fingið bønarsvør í túsundatali, er: „Túsund takk, Jesus, tú ert bara góður!“

*Jan Hanvold* - *Effie Campbell* umsetti.

# Bønirnar hildu henni aftur

*Kurt E. Koch, doktari í teologi*

**Ein kona greiddi soleiðis frá tantu síni, sum lá og stríddist til tað síðsta:**

Síðsta tíðin, tá tanta mín lá sjúk, var eg hjá henni og hjálpti til við at røkta hana. Øll í familjuni bóðu um, at hon mátti gerast frísk aftur. Andadrátturin steðgaði fleiri ferðir, kortini varð hon framvegis enn her.

Endiliga ein dagin slerdi hon eyguni upp og segði við meg: „Johanna, eg havi verið hinumegin markið, yviri í tí handanfyri. Tað er so undurfult har. Eg vildi so fegin blivið verandi har, men so leingi, sum tit biðja um, at eg skal liva víðari her hjá tykkum, kann eg ikki. Bønirnar hjá tykkum halda mær fastari her. Gerið so væl, steðgið við bønunum.“ Vit góvust øll, og beint eftir doyði hon.

Tað er so stórur uggi at vita, at hjá okkum trúgvandi er tað ein undurfullur ævinleiki. Vit eru eisini takksom at síggja, at bønirnar hjá teimum trúgvandi hava eina sovorðna ávirkan. Hetta staðfestir eisini tað, sum Skriftin sigur. – Tað verður eisini sagt um Dwight Moody, hin stóra amerikanska evangelistin, sum búði í Chicago, at hann á deyðastrái bað vinir sínar um ikki at halda seg á lívi við bønum. „Í dag er mín krýningsdagur,“ segði hann.

*Effie Campbell* umsetti.

# TRÚGV er:

tá ið tú prísar **Gudi** í storminum,
tú lítur á **Hann** í dalinum,
og tú fylgir **Honum** í myrkrinum.
*Corrie ten Boom – e.c.* ums.

---

Arbeiðið uttan bøn er **trælaarbeiði.**
Bøn uttan arbeiði er **biddaragongd.**
Men bøn og arbeiði skapar huglagið: **sátt og semju, harmoni.**
*e.c.* ums.

# Ungdómar í kreppu

**Norðmaðurin Hallvard Wiig (29) er siviløkonomur. Hann sigur frá sínum ungdómsárum:**
Í ungdómsárunum kom eg sum so mangur annar í eina kreppu og fór ordiliga niður við nakkanum.

Eg segði starvið frá mær og fór á bíbliuskúla. Tað, sum eg nú síggi, er, at eg hevði leitað eftir at nøkta mín tørv við at gera avrik í ítrótti, í lesnaðinum og í arbeiðinum. So leingi, sum tað gekst væl hjá mær, var eg eyðnusamur. Men tá ið tað miseydnaðist, fyltist eg av ótta. Nú veit eg um tað undurfulla frælsi, vit fáa, tá ið vit seta okkara álit á Kristus og ikki á verðina. Tað ger teg ikki bara eydnusaman, tú „verður ein fríur og frælsur maður." Eg var bundin av at avrika, og lønin var gleðirúsurin. Men so fann **SANNLEIKIN** meg, og í Honum havi eg kent, hvat satt frælsi er.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bønin var ikki ógjørlig

Einaferð fyrst í 1960-árunum var tað ein maður, sum búði í Tamba í Florida. Henda serliga dagin var hann farin oman á flogvøllin, tí konan og teirra fýra børn skuldu koma heim aftur úr Chicago um eina lítla løtu.

Tá ið hann stendur uttan fyri lúkuna, har tey selja ferðaseðlar, verður rópt, at flogfarið er niðurdottið, og øll ferðafólkini hava latið lív. Hann stóð sum steinrunnin, men so fall hann á knæ og fór at rópa á Gud: „Harri, nú mást tú hjálpa mær á ein ella annan hátt."

Har var stúgvandi fult av fólki, men líka legði hann í. Hann útoysti sítt særda hjarta fyri Harranum. Fólkini stóðu og stardu at honum, og teimum tókti so hjartaliga synd í honum, men øll hugsaðu: „Handa bønin er komin ov seint. Tey eru deyð, har er einki at gera.“

Men bíða nú. So verður navn hansara rópt upp, og hann verður biðin at koma til telefonina. Tá er tað kona hansara, sum sigur, at bilurin bleiv í ólagi á veg til flogvøllin, og tey blivu tí ov sein, men tey fóru at koma seinni henda sama dag.

Vit liva í tíðini, men Gud livir í ævinleikanum. Hann visti longu, hvat ið fór at henda, at eitt av børnum hansara fór at rópa um hjálp, og tí skipaði Hann tað so, at bilurin steðgaði, og tey blivu ov sein til hatta flogfarið.

Eitt av lyftum Hansara er: „Áður enn teir hava kallað, man eg svara, bønhoyra teir, áður enn orðið er talað.“ Jes. 65,24.

*Effie Campbell.*

# Prógv

Tá ið tú lesur onkra vísindaliga grein um Gud og trúnna, eisini slíkar, sum „kristin“ hava skrivað, tá sært tú ofta henda setningin:

„Vit vita jú, at trúgvin á Gud í veruleikanum ikki kann **prógvast.“**

Hvat meina tey?

Í 1. Kongabók bjóðar Elias teimum av, sum tilbóðu falskar gudar. Hann segði: „Møtið mær á Karmel! Tann Gud, sum svarar ... hann er Gud! Og fólkið segði: „Tað er rætt!“ Tí tað er sanniliga **prógv** – bæði fyri høvd og hjarta, tá ið Gud svarar!

*TF-blaðið – e.c.* ums.

---

**„Tú kanst ikki avgera, hvat ið børn tíni skulu trúgva;** men tú kanst taka ta avgerð at byggja eitt heim, har náðin hevur størri týdning enn reglur, materialisma, perfektionisma ella annað, sum beinir fyri hitanum og kærleikanum,“ sigur Kai Johansen, pastorur.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 23. aug. | **Tekstur:** Matt. 17,1–13 | **Bíbliuorð:** Matt. 17,5b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 18** *30. august 2026* **86. árg.**

# Broytingin má koma innanífrá

Ein kvinnuligur trúboðari kom inn til eini ensk hjún í Suðurafrika. „Hvat er tað, sum tú lærir afrikanarar?“ spurdi maðurin.

„Eg læri teir tað, sum evangeliið sigur,“ segði trúboðarin. „Eg vísi teimum, hvussu synd skilir okkum frá Gudi, og eg vísi teimum, hvussu Harrin Jesus doyði í okkara stað á krossinum at frelsa okkum frá syndum okkara, og um vit ikki taka ímóti hesi frelsu, koma vit ongantíð inn í Himmalin.“

Maðurin spurdi, hvørjar syndir hon tosaði um, og hon svaraði, at tað vóru millum aðrar at stjala, lúgva og banna og tilbiðja teir illu andarnar.

„Ja,“ segði maðurin, „tað er mikið gott; men tit vænta ov nógv av teimum, teir eru als ikki til reiðar at verða undirvístir í religión. Lær teir heldur at vera ærligar og at liva siðiliga, tað er alt, teir eru førir fyri at skilja. Tað fer at taka fleiri ættarlið enn, áðrenn teir kunnu fata nakað um Gud.“

„Tú misskilir alt, tí eingin læra er, sum kann gera teir ærligar, reinar og siðiligar. Broytingin má koma innanífrá, og tað hendir bert, tá ið Jesus kemur inn í hjartað, tí so tekur hann alla syndina burtur og gevur okkum ynski og vilja at gera hitt rætta.“

„Eg eri ikki religiøsur,“ segði maðurin, „eg gangi næstan ongantíð í kirkju.“

„Tað at ganga í kirkju og á møti er ikki tað, sum frelsir eina menniskju. Bert Jesus frelsir. Hann gav lív sítt fyri syndir okkara. Frelsan er ein gáva, um vit bara vilja taka ímóti henni, segði trúboðarin.

„Ja," helt maðurin fyri, „Jesus er so miskunnsamur. Hann man óivað fara at fyrigeva mær."

„Ja, men treytin er, at tú tekur ímóti honum sum tínum persónliga Frelsara," segði trúboðarin. „Tú vart noyddur at giftast, áðrenn kona tín av sonnum gjørdist kona tín, og kennskapur tín til hennara frammanundan hesum kundi ikki binda tykkum saman á sama hátt sum hjúnalagið, og ein vissur kunnleiki um Jesus hjálpir tær heldur ikki. Tú mást taka ímóti honum, áðrenn hann er tín og tú hansara."

Brádliga stóð alt so greitt fyri honum, og hjúnini vórðu ógvuliga rørd, tá ið trúboðarin eggjaði teimum at falla á knæ og yvirgeva seg til Jesus og bjóða honum at koma inn í hjarta sítt.

*„Kirkeklokken".* – *Effie Campbell* umsetti.

# Rætt honum kvittanina

*Emanuel Minos*

Undir krígnum, tá ið Noreg var hersett, høvdu vit ikki loyvi at ferðast meir enn tríggjar míl. Tað vóru torførar tíðir hjá pápa, sum var prædikumaður. Men so fingu vit nakrar útpostar frá Filadelfiasamkomuni í Oslo, sum vit skuldu røkja. Pápi og eg býttu hesar postar millum okkara. Eg fekk tveir, Holtet og Abildsø, hóast eg bara var 15 ára gamal. Fólk sluppu ikki at fara í dans ella biograf, alt var bannað, og so fóru tey á møti staðin fyri, og vit upplivdu veking.

Eitt húski, sum kallaðist Joensen, varð frelst. Eg nevni eftirnavnið hjá teimum, tí tey eru heima hjá Harranum nú, fornøvnini minnist eg ikki. Konan varð fyrst frelst, síðani maðurin og so sonur teirra. Konan bjóðaði okkum at hava húsmøti hjá teimum. Hon var so eldhugað, sum bara ein nýfrelstur kann vera.

Á einum húsmøti vitnar konan og sigur, at steikipannan hjá teimum var brotnað. Hon sigur so við mannin: „Nú mugu vit biðja Gud geva okkum eina nýggja steikipannu."

„Vit kunnu ikki plága Gud við einari steikipannu," helt maðurin fyri.

„Hevur tú onga trúgv? Ert tú ikki vorðin frelstur? Gud kann gera alt," svaraði konan aftur.

So teskaði maðurin til mín: „Veitst tú, kona mín er so treisk, at tá ið hon fyrst byrjar, gevst hon ikki, so fyri at fáa húsfrið, segði eg: Ja, ja, ja."

Tey tóku so sporvognin inn til Oslo til tann stóra handilin, Glasmagasinet. Tey vóru tey fyrstu, sum vóru uppseld. Hetta var í 1943.

Konan sigur so við krambakallin: „Hava tit eina steikipannu?"

Hann stóð tigandi eina góða løtu og bara stardi at henni. So segði hann: „Frúa, vit hava langt síðani selt allar og eru í uppisetri. Men ein steikipanna er eftir uppi á lagrinum. Eingin hevur spurt eftir hesi pannu; men eftir sum tygum spyrja, so skulu tygum fáa ta allarseinastu steikipannuna, sum vit eiga."

So fekk hon steikipannuna, og tey tóku sporvognin heim aftur. Hon var so upplyft og glað. „Sært tú," segði hon við mann sín, „Gud svarar upp á bøn." Hon var so sæl, at maðurin næstan ikki fekk hildið henni í friði har inni í sporvogninum. Hon lovaði og prísaði Gudi.

Tá ið tey komu til hús, setti hon steikipannuna á komfýrin og fall á knæ og lovaði og prísaði Gudi – og so bleiv hon doypt í Heilaga Andanum – uppi yvir einari steikipannu! Maðurin fellur so á knæ, og so verður hann doyptur í Heilaga Andanum. Tá ið sonurin kemur úr skúla, liggja bæði foreldrini á knæ á køksgólvinum og lova og prísa Gudi. Tey tosa ikki norskt, og sonurin spyr, hvat ið hetta er fyri nakað? Tey siga, at tey eru doypt í Heilaga Andanum. So fellur sonurin á knæ, og tá verður hann eisini doyptur í Heilaga Andanum.

Vinir mínir, vit hava ein máttmiklan Gud, sum svarar upp á bøn. Hann svarar í stórum og smáum upp á tað, sum viðurferst okkum í gerandisdegnum. Langt frammanundan, at bønin varð biðin, hevði hann gjørt tað so, at ein panna var eftir, og at eingin kom at spyrja eftir henni, so at henda konan, ið leit fult og heilt á hann, skuldi fáa hana. Men vit mugu senda kvittanina fyri bønarsvarið uppaftur til Himmals. Fyrr, tá ið postboðið kom við einum pakka, segði hann: „Skriva undir her og kvitta fyri, at tú hevur móttikið pakkan." Vit mugu ikki gloyma at lova og takka Gudi fyri bønarsvar.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sum Lot er ein mynd** upp á ein verðsligan kristnan, er eisini hjúnalagið hjá Ábraham við Hagar verðsligt og ein menniskjanslig loysn. Menniskju hava sjáldan tíð at bíða eftir Gudi.

*e.c.* ums.

## Lønin, sum verður býtt út, er fimm ymiskar krúnur

1. **Sigurskransur** – krúnan hjá teimum, ið sigra. *(1. Kor. 9,25).*
2. **Lívsins krúna** – krúnan hjá teimum, sum lata lív sítt fyri Jesusar skuld. *(Opb. 2,10).*
3. **Hin ófølnandi kransur dýrdarinnar** – krúna hjá leiðaranum fyri kirkjuliðinum. *(1. Pæt. 5,4).*
4. **Rættlætiskransurin** – til tey, sum hava glett seg til komu Harrans. *(2. Tim. 4,8).*
5. **Heiðurskransurin** – krúnan hjá teimum, sum vinna sálir fyri Harran. *(1. Tess. 2,19).*

*e.c.* ums.

# Deyðaangist

Ein maður sat á songarstokkinum hjá einari gamlari konu, sum lá at doyggja. „Ert tú til reiðar at leggja út á ta síðstu stóru ferðina?“ spurdi hann. Tá lýsti andlit hennara upp, og hon segði: „Jesus segði: „Eg gevi mínum lombum ævigt lív.“ Tað er gott. Eg kann ikki gera meira ... Eg eri trygg í hondunum á tí góða hirðanum. Hann gav lív sítt fyri okkum. Hann hevur gjørt eitt rúm til reiðar til mín í faðirhúsinum.“

Tá ið ein vinkona hennara frætti hetta, segði hon: „Eg eri so glað at hoyra hetta, tí ofta hugsi eg, um Djevulin fer at taka frelsuvissuna frá mær í deyðastundini.“

Tá svaraði ein sjúkrasystir, sum eisini var har til staðar: „Sig Harranum, at tú hevur henda óttan. Bið so um, tá ið deyðastundin kemur fyri teg, at Jesus skal verja teg móti álopum frá fíggindanum. Bið um, at hann má geva tær eina fulla vissu um, at hann er tær nær. Hann segði jú: „Eg eri við tykkum allar dagar.“ Hasari bønini fer hann at svara. Eg havi sæð mong menniskju doyð. Øll, sum bóðu hasa bønina frammanundan, doyðu friðfylt og í fullari vissu um Jesu nærveru og frelsu. Eg sá tað á andliti teirra.“

*Effie Campbell* umsetti.

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 30. aug. | **Tekstur:** | Luk. 8,22–25 | **Bíbliuorð:** | Luk. 8,25b |
| 6. sept. | **Tekstur:** | Jóh. 1,18b; 11,3–4 + 17–44 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 11,25 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74